# EG HAVI FINGIÐ NØKUR ORDANS HØGG

HANN KANN VERÐA **HARÐLIGUR** OG **ILLUR** Í RÆTTA SAMANHANGINUM, MEN VIL IKKI VÍSA TAÐ **ALMENT**. HANN ER SKIPARIN, SUM HEVUR TRÍGGJAR FYRRVERANDI SKIPARAR Í MESSUNI, OG HANN ÆTLAR SÆR **IKKI** Í LAND HÓAST **ATFINNINGAR** – SO VIL HANN HELDUR FARA NIÐUR VIÐ **SKIPINUM**. VIT TOSA VIÐ **KAJ LEO JOHANNESEN** UM HANSARA STÍL OG AVRIK SUM LØGMAÐUR



**INTERVIEW**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Hann smílist.

Vit snakka um Kaj Leo Johannesen, og so er tað kanska ikki so løgið.

Løgmaðurin, sum hevur valt sær tann positiva stílin, er í góðum lag hendan fyrrapartin, vit stíga inn á skrivstovu hansara uttast í Tinganesi.

Men í dag er hann ikki bara glaður. Hann er glaður av einari orsøk.

Hann hevur júst lisið á telduskíggjanum, at skattainntøkurnar hjá landinum fyrsta ársfjórðing eru vaksnar við næstan fimm prosentum.

Og so er tað, at løgmaður smílist.

– Tað er ótrúliga hart og mentalt krevjandi at verða løgmaður í truplum tíðum sum hesum, og tú skalt hava eina turkatrúgv upp á, at tað ber til, og at tað er ljós fyri framman. Men eg trúgvi upp á tað, og tey seinastu tølini styrkja meg í trúnni, at vit fara at koma burtur úr kreppuni. Hetta vísur, at fólk trúgva upp á eina framtíð í Føroyum, sigur Kaj Leo Johannesen.

– Vit skulu tora at viðurkenna, at vit hava gjørt okkurt skeivt, men vit hava sanniliga eisini gjørt okkurt rætt, sigur hann.

### Staðið fyri skotum

Kaj Leo Johannesen hevur verið løgmaður í Føroyum síðani 26. september í 2008. Hann hevur sitið við róðrið í hálvtannað ár, og hetta hevur verið ein buldralig tíð í føroyskum poltikki.

Løgmaður hevur eisini staðið fyri skotum. Hann hevur verið lagdur undir at taka ov lætt upp á tingini, at



*– Vit hava havt eitt ódnarveður, og tá er tíðin ikki at leypa fyri borð, sigur løgmaður*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

> Tað nyttar einki, um øll sita sum grátikonur við høvdinum í fanginum og siga, at landið er farið á heysin

verða ov positivur og ikki stýra ABC-samgonguni.

Støðan í samgonguni tykist verða eitt sindur trupul at greiða í løtuni, og umstrídda uppskotið um fíggjarkarmin fyri komandi árini hevur fingið fyrstu viðgerð í løgtinginum hesa vikuna.

Hósdagin fyrrapartin vóru vit á gátt hjá Kaj Leo Johannesen í Tinganesi og spurdu hann, hvussu hann sjávur upplivað hesar 18 mánaðirnar sum Føroya løgmaður, og um hann sjálvur heldur, at hann er ov positivur – á markinum til tað naiva.

**Hvussu hevur tú upplivað tíðina sum løgmaður?**

– Nú hoyrir mann ofta, at fólk siga, at tað er eingin leiðsla í landinum. Og tað er takknemligt at siga tað. Vit brúktu tað sjálvi, tá ið vit vóru í andstøðu. Men hvat er leiðsla? Er tað at knalla nevan í borðið og siga, at nú finni eg meg ikki í hesum longur? Tað kundi eg sjálvur hugsað mær at gjørt við hvørt, men eg havi ikki bara ábyrgdina av mær sjálvum. Eg havi ábyrgdina av Føroyalandi, og tá eg havi so stóra ábyrgd, kann eg ikki at leypa fram av. Eg kann ikki bara koyra mín veg sjálvur, smekka nevan í borðið og ikki lurta eftir øðrum. Tað einasta, mann fær burtur úr tí, er, at mann endar í einum horni við ongari ávirkan.

– Politikkur er eitt sindur sum fótbóltur. Tú kanst gott spæla illa í eina tíð, men tú kanst ikki áhaldandi spæla illa. Tí so troyttast tú. Eg má gera alt, sum er í mínari makt, fyri at finna semjur, og eg kann ikki geva upp, áðrenn dysturin liðugur. Tað, sum er avgerandi, er úrslitið.

**Hvussu metir tú um avrikini hjá ABC samgonguni?**

– Eg haldi, at vit hava gjørt nógv skeivt. Men vit hava eisini gjørt nógv rætt. Fyri tveimum árum síðani tosaðu summi um at høggja bremsurnar í og spara einar 600 milliónir krónur eftir einum ári. Tíbetur gjørdu vit ikki tað, vit valdu heldur at gera tað meira líðandi, og eg ivist ikki í, at tað var ein røtt avgerð.

– Hinvegin eru vit farin ov nógv niður í smálutir, nú vit til dømis hava arbeitt við fíggjarkarmunum. Vit skulu ikki sita og diskutera útreiðslur á 50.000 ella 100.000 krónur. Tað skulu vit halda